ítróttur

Nr. 217 • fríggjadagur • 14. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# ÍtróttarFøroyar verða endavendar

## Húsarannsókn í Klaksvík

**Í Stjørnuni máttu tey mikukvøldið standa skúlarætt fyri løgregluni, sum vildi hava alt at vita um øll loyvir hjá útlendsku leikarunum í felagnum**



*VÍF er í ferð við at smildra føroyskan hondbólt sundur, sigur formaðurin í starvsnevndini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, Gestur Hovgaard*

ÚLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Løgreglan er av álvara farin undir at kanna spæliloyvini hjá útlendskum leikarum í Føroyum. Tað máttu tey í Klaksvík ásanna, tá tey mikukvøldið brádliga máttu standa til svars fyri, hvussu útlendingarnir hjá teimum vóru komnar til landið.

Og tað er einki dulsmál, at tey í Klaksvík eru alt annað enn fegin um, hvussu útlendingamálið nú tykist at koyra.

Gestur Hovgaard er formaður í starvsnevndini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, og sjálvt um hann ikki stendur fyri hondbóltsdeildini, so hevur hann í sessinum evstu ábyrgdina av felagnum. Og hann helt tað vera nógv fyri, at eitt hondbóltsfelag soleiðis er farið til fútan fyri at fáa málið staðfest.

– Fyri at siga tað akkurát, sum tað er, so er mín meting, at VÍF er í ferð við at smildra føroyskan hondbólt sundur. Meintu teir nakað við hesum – annað enn at melda málið - so varð hetta tikið upp á fundi í HSF. Har høvdu feløgini kunnað tosað sínámillum um, hvussu hetta skuldi gerast, og so var fútin so ikki íblandaður av hesum ávum, eru greiðu boðini.

– At VÍF hevur havt sínar trupulleikar við at fáa leikarar til landið, er eingin umbering í so máta. Teir hava beinleiðis nevnt onnur feløg í sínum skrivi, og so fútin noyddur at kanna hesi, og so er skjótt, at ákæra kann reisast.

Og at hetta kann fáa stórar avleiðingar fyri allan føroyskan ítrótt, er Gestur ikki í iva um.

– Frammanundan eru nógv feløg, sum nóg illa hóðra undan. At tey kortini gera tað, er tí eldsálir kring landið leggja eina rúgvu av tíð og orku í felagsarbeiðið. Kanska kenna tey ikki altíð allar lógvir, so sum donsku útlendingalógina, men eg ivist ikki í, at eingin av hesum snýtir við vilja. Tey hava gjørt arbeiðið í allar bestu meining, og at tey soleiðis skulu revstast fyri arbeiðið, tí at nakrir vestmenningar hava fingið ilt onkra staðni, er nógv fyri, staðfestir KÍ-formaðurin.

Í Klaksvík var tað annars Kristofftur Ragnarsson, formaður í hondbóltsdeildini, sum mátti svara fyri løgregluni, og tó at hann harmaðist gongdina í málinum, so var hann ikki heilt so hvassorðaður sum starvsnevndarformaðurin.

– Hjá okkum vóru øll pappírini í lagi, so har var einki at heinta. Vit hava alla tíðina syrgt fyri, at røttu mannagongdirnar eru nýttar, og so hava vit bara góðtikið, at málini hava tikið ta tíð, tey hava tikið, sigur Kristoffur.

– Eg skal ikki standa her og verja VÍF á nakran hátt, men mín fatan er, at tú hevur við slíkt at gera, so mást tú seta teg inn í tær reglur, sum eru galdandi. Tað hevur VB eftir øllum at døma ikki gjørt, og tað er sera harmiligt. Tí eingin ivi skal vera um, at eisini vit eru sera keddir av, at málið nú tykist fara so langt, sum tað er farið, sigur Kristoffur.



*Aukse Vysniaskaite er ein av útlendsku leikarunum í VB, sum nú er undir ákæru frá danska útlendingastýrinum. Ein ákæra, sum uttan iva fer at senda veldugar skelkir gjøgnum samlaða føroyska ítróttarheimin*

**Skuldsetingarnar flúgva gjøgnum luftina millum føroysku hondbóltsfeløgini, og løgreglan er nú av álvara farin at gera um seg**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Rættilig øði kom í grindina, tá tað gjørdist greitt, at ein fyrispurningur frá VÍF til fútan er tikin upp sum politimál. Fyrispurningurin, sum er prentaður aðra staðni á síðuni, snýr seg um, hvørjar reglur eru galdandi fyri útlendsk ítróttarfólk í Føroyum.

Løgreglan hevur eftir øllum at døma kannað málið, men enn hevur VÍF so ikki fingið nakað svar. Hinvegin hevur hevur VB í øllum førum fingið av at vita, og mikukvøldið kundi Útvarpið boða frá, at danska Udlændingestyrelsen hevur kravt, at Aukse Vysniaskaite og Asta Armonaviciute verða sendar av landinum.

Víðari varð sagt, at sakførarin hjá VB, Christian Andreasen, hevur kært hesa avgerð, eins og hann hevur biðið um, at eingin verður sendur av landinum, fyrr enn kæran er viðgjørd.

Um sama mundið, sum Útvarpið bar tíðindini, máttu tey í Klaksvík eisini standa skúlarætt. Her hevði Stjørnan undan árinum fingið tríggjar útlendskar leikarar, og kannað varð nú, hvørt pappírini hjá hesm vóru í lagi, og tað vóru tey so eftir øllum at døma. Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so hevur hetta tó eisini vakt øði í Klaksvík, har starvsnevndarformað.-urin, sum ikki er heilt ókendur í Vági, langar út eftir vestmenningum.

Slaturin vildi eisini vera við, at Neistin hevði fingið vitjan, og at Lina Andriulyte skuldi verða send av landinum, men sambært teimum upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið um málið, er einki í hesum. Enn hevði so eingin í Neistanum fingið vitjan av løgguni, og sum skilst vóru øll pappír her eisini komin í rættlag.

Kjarnin í øllum málinum tykist vera, at leikararnir hjá VB eru komnir til Føroyar sum vanlig ferðafólk. Til slíkt krevst bara vanligt ferða- (turist) visum, og tað hava tey í Vági hildið vera nóg mikið. Hetta er eitt nú loyvt í Danmark, har kunngerð gevur ítróttarfólki loyvi at virka fyribils við slíkum loyvi, men tann kunngerðin er ikki galdandi í Føroyum.

Sum skilst, so er tað heldur ikki enn soleiðis, at útlendsku leikararnir í Vági hava arbeiði, tí arbeiðsloyvið er jú ikki komið upp á pláss. Men sambært ákærunum, so er tað nóg mikið, at leikararnir hava móttikið nakrar veitingar frá VB. Í hesum førinum hevur VB syrgt fyri ferðaseðlunum, tá útlendingarnir eru komnar til landið, eins og hesi eisini skulu hava eitt stað at búgva, og hetta hevur ákærin heft seg við. Sambært skattalógini er slíkar veitingar at rokna sum skattskyldug inntøka, og skalt tú hava skattskylduga inntøku í einum landi, er neyðugt við arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Hetta hava eftir øllum at døma ikki hugsað um í Vági. Og at meta eftir útlendingalógini, so kann hetta geva eina harða revsing.

§ 59, stk. 2 í lógini sigur, at «Med bøde, høfte ella fængsel indtil 1 år straffes en, som beskæftiger en udlænding uden fornøden arbejdstilladelse på Færøerne...«. Altso kann leiðslanVB, sum í hesum førinum verður roknað sum arbeiðsgevarin, í ringasta føri standa til fongsulsrevsing í eitt ár. Hetta tó treytað av, at lógarbrotið er framt við vilja ella við grovum ósketni og við fíggjarligum fyrimuni fyrimuni fyri eyga, og tað er ilt at ímynda sær, at hetta skuldi verið galdandi í førinum hjá VB.

### Tøgn í HSF

Meðan málið soleiðis rumblar ógvusligani í feløgunum kring landið, tykist Hondbóltssambandið standa sum tigandi aktørur á síðulinjuni. Okkum hevur ikki eydnast at fingið orðið á formannin í HSF, Eivind Jacobsen, sum er burturstaddur í arbeiðsørindum, men sum skilst, so hevur HSF enn ikki lagt seg úti málið.

Spurningurin er so, hvørt tað hevði gjørt nakran mun, um HSF biðjur myndugleikarnar hyggja við eitt sindur mildari eygum eftir málunum, men við at standa tigandi, kann tað einans elva til, at ákærur um passivitet fara at hegla oman yvir sersambandið.

Hvussu er og ikki, so er undir øllum umstøðum líkt til, at ein kavabóltur er farin á rull. Ikki bara innan hondbóltin, men so sanniliga eisini innan allan føroyskan ítrótt, tí er fútin fyrst farin at grópa hjá einstøkum hondbóltsfeløgum, so er lítið at ivast í, at onnur feløg kunnu vænta sær vitjan. Hvørjir vinnararnir eru í hesum spælinum er ilt at síggja, men taparnir kunnu helst gerast fleiri. Í løtuni tykjast tvær litaviskar hondbóltskvinnur og leiðslan í VB at standa á hesum lista, og eingin trygd er fyri, at tann listin ikki verður longdur í næstum.

## Eitt keðiligt mál

Hóast ein stórur kavabóltur tykist vera farin á rull í føroyska hondbóltsheiminum, so heldur formaðurin í VÍF, Jógvan Sigurd Poulsen, framvegis fast um tey sjónarmið, sum hann áður hevur ført fram.

- Tað, sum vit vildu við hesum var, at greiðar spælireglur skuldu vera á økinum. Tað er líkt til, at hetta nú verður galdandi, og í so máta er endamálið rokkið, leggur hann fyri.

– Men tá tað er sagt, so harmar tað meg ótrúliga nógv, at málið er komið somikið langt, sum tað er. Tað hevur ongan tíð verið okkara ætlan, at leikarar skuldu tveitast av landinum, og heilt erligt, so hevði eg ikki fyristillað mær, at hetta skuldi henda.

– Men um tú spyrt, um eg siti eftir við ringari samvitsku, so er svarið nei. Reglurnar eru til fyri at tær skulu haldast, og so ber tað ikki til, at summi bara gera, sum teimum lystir. Vit hava alla tíðina syrgt fyri, at okkara pappír eru í lagi í slíkum førum, og tað vóna vit, at tey eru, hóast vit enn ikki hava hava fingið nakra viðmerkingin frá fútanum um fyrispurning okkara.



*Formaðurin í VÍF harmast gongdina í málinum, men heldur at upprudding var neyðug*

Tað hava vit so heldur ikki fingið frá HSF, og tað undrar okkum ikki sørt, má eg siga. Men sjálvt um reglurnar kunnu tykjast tungar, so hava vit altso valt at fylgt teimum, sigur altso VÍF-formaðurin.

## Brøvini

Niðanfyri prenta vit brøvini frá VÍF, sum eftir øllum at døma hava fingið sannan eld í málið um útlendingar í bestu føroysku hondbóltsdeildini.

Tann 15. oktober sendir VÍF soljóðandi skriv til Føroya Landfúta:

»Viðv. arbeiðs/uppihaldsloyvum til ítróttarfólk, ið koma til landið

Vestmanna Ítróttarfelag hevur tey seinastu árini havt eysturlendingar at hjálpa okkum við hondbóltinum her í bygdini. Tá ið vit á fyrsta sinni fóru undir at arbeiða við at hesi fólk til landið, ráðførdu vit okkum hjá fólki, ið arbeiða hjá omanfyri nevnda stovni. Vit eru sera væl nøgd við ta ráðgeving, vit hava fingið, og skulu tit hava rós fyri góða ráðgeving og hjálpsemi øll árini.

Tað, sum vit nú standa spyrjandi yvirfyri er, eru ikki øll líka fyri lógini? Okkara royndir vísa, at tað tekur tíð at fáa allar formalitetir í lagi, millum 3 og 6 mánaðir, og tað er so nakað, ið vit hava valt at góðtikið. Í seinastuni hava vit verið vitni til, at onnur feløg, ið vit kappast við, hava megnað at fáa leikarar til landið við øllum í lagi upp á onga tíð, 5 dagar, ella eru øll loyvini í lagi? Ella eru tað vit, ið eru skeivt ráðgivin øll árini?

Vit vilja við hesum heita á tykkum um at kanna, um tað er Vestmanna Ítróttarfelag, ið ger nakað skeivt, ella tað eru hini feløgini, ið nýta skeivar mannagongdir.

Feløgini, ið vit hugsa um, eru:
VB 1. deild kvinnur (2 leikarar)
Neistin 1 deild kvinnur (1 leikari)
Stjørnan 1. deild kvinnur (3. leikarar)«

Sama dag sendir VÍF hondbóltssambandinum avrit av skrivinum, saman við hesum brævi:

»Viðv. spæliloyvum hjá útlendskum leikarum

Vit hava í dag sent Føroya Landfúta hjálagda skriv.

Í hesum sambandi fer Vestmanna Ítróttarfelag at heita á tykkum at kanna, um allar reglur eru fylgdar viðvíkjandi hesum leikarum.
• Hava allir leikararnir uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum?
• Hava teir galdandi spæliloyvi í Føroyum?
• Eru allir spælararnir leysgivnir av sínum útlendsku feløgum?
• Er EHF kunnað um, at teir leika í Føroyum?«

Tá tað kemur fram, at fútin hevur tiki málið upp sum politimál, uttan at VÍF er vorðið kunnað um hetta, sendir VÍF nýtt skriv til Føroya Landfúta:

Vísandi til skriv okkara, sent í faxi 15.10.03, og í posti sama dag, skal hervið verða sagt f´ra, at skrivið møguliga kann skiljast sum eitt "politianmeldilsi" av feløgunum, nevnd eru í skrivinum. Tað er tað ikki, og Vestmanna Ítróttarfelag noktar fyri, at skrivið kann verða nýtt í møguligari ákæru móti nevndu feløgum.

Spurningurin hjá Vestmanna Ítróttarfelag er, um tað er loyvt útlendskum leikarum at leika í/við føroyskum ítróttarfelag, um so er, at endaligt uppihalds- og arbeiðsloyvi ikki er komið í rættlag.

Ítróttarsambondini – í hesum føri HSF og EHF – hava givið neyðug spæliloyvi, ið er galdandi samb. teirra lógum og reglum, men okkum er gjørt kunnugt av myndugleikunum, at ein treyt fyri at útlendingar kunnu leika við føroyskum ítróttarfelag er, at arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru komin endaligt í rættlag.

Vit vilja hava staðfest, um uppihalds- og arbeiðsloyvi krevst ella ikki krevst, fyri at útlendingar kunnu venja og leika við føroyskum ítróttarfelag, eftir at føroyskt ítróttarsamband, saman við avvarandi útlendskum ítróttarsambondum, hava avgreitt teirra loyvir, galdandi eftir teirra reglum og lógum.

Vestmanna Ítróttarfelag ákærir ongan fyri lógarbrot. Vestmanna Ítróttarfelag ynsir at fáa greiðu á treytum fyri útlendingum í føroyskum ítróttarhøpi, so vit – og onnur við - eru vitandi um, hvussu arbeiðast skal frameftir.«